# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Timberlake á fløsku

Tað sigst, at Justin Timberlake er við at tilrættisleggja eina almannakunngerðing av sínum egna Tequila merki. Justin er sæddur á einari Tequila fabrikk fyri stuttum, og har bleiv hann fangaður av upptøkutólum, meðan hann smakkaði sær á ymisk sløg av Tequila. "Hetta var ein av hansara mongu fundum seinastu árini, ið hann hevur havt fyri at útvikla hansara egna Tequila handil", sigur eitt umboð fyri Justin Timberlake. Justin hevur eisini almannakunngjørt sína egnu kollektión av klæðum við merkinum William Rast, og hann var við til at sniðgeva New Yorks Southern Hospitality matstovuna.



# Petur Pólson:
# – »Tokyó« kemur í apríl

Nýggj slóðbrótandi fløgan frá Petur Pólson í apríl. Heimsins besti gittaristur sýnir síni kynstur á nýggju fløguni

Kendi tónleikarin, Petur Pólson, er nú aftur ávegis við einari fløgu. Slóðbrótandi tónleikurin á fløguni er sambært Peturi øðrvísi, enn nakað vit áður hava hoyrt.

- Eg havi spurt meg fyri, og tey fólkini, ið hava hoyrt míni løg siga, at tey aldrin áður hava hoyrt slíkan tónleik, sigur Petur við Planet.

Fløgan ber heitið "Tokyó", og kemur eftir ætlan á gøtuna seinast í apríl.

Fløgan er tikin upp í Sandavági ímillum mars 2008 og mars 2009. Petur hevur sostatt nýtt yvir eitt ár uppá innihaldið á nýggju fløguni, og at enda er hon til reiðar at vísa almenninginum .

- Vit hava nýtt ótrúliga orku uppá fløguna, og eg haldi hetta er tað besta eg nakrantíð havi gjørt, sigur hann við Planet.

Bogi á Lakjuni, sum er framleiðari, hevur saman við Peturi arbeitt seinasta árið við fløguni.

Heimsins besti rokkgittaristur við á fløguni

Á "Tokyó" hevur Petur fingið ein forkunnugan gestatónleikara. Amerikanski rokkgittaristurin Ty Tabor, sum er best kendur úr rokkbólkinum King's X, spælir á einum lagi. Ty Tabor er serstakliga viðurkendur og ekvillibristskur gittarleikari. Í 1993 og 94 varð hann kosin



heimsins besti rokkgittaristurin av Guitar Player blaðnum.

**Ljóðblandað í Keypmannahavn**

Í hesum døgum er fløgan til ljóðblandingar, og síðsta hondin verður nú løgd á tey forkunnugu løgini hjá Peturi. Tað er Jens L. Thomsen, ið ljóðblandar niðri í Lundgaard Studios í Keypmannahavn.

Tónleikararnir á fløguni eru at kalla teir somu, sum spældu á fyrstu útgávu Peturs, Koma, sum kom út í 2005. Petur Pólson syngur og spælir gittar. Bogi á Lakjuni er – umframt at vera framleiðari – multiinstrumentalist og spælir gittar, keyboards, glockenspiel, percussion og forritan. Eiler Hansen spælir gittar. Knút H. Eysturstein spælir keyboards og onkran gittar og syngur kór. Jens L. Thomsen spælir bass. Uni Árting spælir trummur. Á tveimum løgum er tað Høgni Lisberg sum spælir trummur. Á nýggju fløguni hevur Petur eisini fingið tríggjar kvinnuligar kórsangarar - Dorthea Dam, Jensia Dam og Óluva Dam. Hesar verða eisini við á konsertunum, sum verða lýstar seinni.

**Hoyr løgini á internetinum**

Longu fyrsta apríl verður møguleiki at hoyra tvey løg av komandi fløguni hjá Petur Pólson. Í fyrstu atløgu verða tey at hoyra á heimasíðunum www.peturpolson.com og myspace.com/peturpolson, sum verða endurgjørdar komandi dagarnar. Endaliga dagfestingin fyri sjálvari útgávuni er ikki alment váttað enn, men roknað verður við at tvær konsertir verða flaggdagsvikuskiftið, fríggjakvøldið 24. og leygarkvøldið 25. apríl. Hvar og nær hesar verða, verður kunngjørt seinni.

Á "Tokyó" eru 13 løg: Tokuljóð, Bivan, Mín sál er troytt, Alt á gosi, Mist, Gjóstur, Svart klæði fyri vindeygað, Blikalogn, Fepur, Andvekur, Útlegd, Alt sum blómar, Endi (15.55). Tað er plátufelagið Tutl, sum gevur út.

## Hjálp til ung offur

Hvat gert tú, um tú ert í einum parlagi, har makin er kontrollerandi og harðligur? Og hvat gert tú, um tú hevur illgruna um, at barn títt er í einum harðligum parlagi?

Ein nýggj heimasíða, ditforhold.dk, ráðgevur bæði ungum, ið eru í harðligum parløgum, umframt foreldrum og vinum, ið standa á síðulinjuni og hyggja.

Ditforhold.dk er í høvuðsheitunum tilætlað ungum ímillum 14 og 24 ár, ið eru í nýggjum parløgum.

Ein kanning frá Statens Institut fyri Folkesundhed vísur, at 77 prosent av ungum kvinnum, ið uppliva harðskap frá makanum ikki leita sær hjálp. Fyri ungar menn er talan um 84 prosent. Tað er sostatt truplari hjá monnum at søkja hjálp, um teir hava verið útsettir fyri harðskap frá makanum.

Tað er millum annað trupult, tí maka-harðskapur er eitt sera tabulagt evni. Tey ungu hava trupulleikar við at siga sannleikan fyri øðrum. Tað er eisini trupult fyri familju og vinir at vita hvat tey skulu gera, um tey hava illgruna um harðskap í einum parlagi. Við at práta um trupulleikarnir, kanst tú hjálpa tí unga víðari og fyribyrgja framtíðar harðskap.

Á heimasíðuni ditforhold.dk kanst tú millum annað lesa um hvørji tekin tú skalt verða varugur við, og hvussu tú skalt tosa um evnið.

Heimasíðan eitur www.ditforhold.dk.

